



Myndir: *Jens Kristian Vang*



metrar lang, og har var mangt gott at ogna sær. Eisini var tað bara mannligir barvørrar at síggja ílatir sera flott.

### Forvitin frøist

Um vit hugsa út um kassan og síggja kvinnurnar frá Sex and City í einum størri perspektivi, so sæst, at tær í veruleikanum kunna umboða fýra síður av einari kvinnu. Tað menniskjaliga, moralska, lystir og kærleika sum eru eginleikar vit øll eiga í okkum. Carrie er tann menniskjaliga og sera umhugsin. Miranda hevur sterkan moral, klók og karieru-sinnað kvinna.

Samantha letur seg stýra av lystum, er frí og impulsiv. Charlotte trýr á tað besta í menniskjanum, tann reina kærleikan, er naiv og ein droymari. Sosialurin gjørdi eina spurnarkanning til mannfólkið, sum var í høllini á Hálsi. Hvat halda teir um kvinnurnar í Sex and the City, og hvørja dáma teimum best? Soleiðis var borið í land.

**Carrie:** 17%
**Miranda:** 8%
**Samantha:** 33%
**Charlotte:** 15%
**Ongan kunnleika til Sex and the City:** 27%

### Modernaði feministurin

Ein hugleiðing um filmin og cocktailparty á Hálsi.

Fólkini handan blaðið "Kvinna" stóðu fyri hesum megnaðararbeiðinum, og tað var gjørt ótrúliga nógv burturúr. At byrja við virkaði tað eitt sindur plat og yvirdrívið at gera so nógv burturúr einum filmi. Eg mátti suffa, tá ið eg sá allar plakatirnar og hugsaði við mær sjálvum, at ein filmur, sum hevur tørv á so góðari reklamu, má verða vánaligur, okkurt er í øllum førum ikki, sum tað eigur at verða. Men eftir at eg hevði vant meg við tankan og set spurnartekin við tiltakið, kom eg fram til eina loysn. Jú, har er okkurt galið, tað eru kvinnurnar og kynslívið, sum ikki síggja dagsins ljós, sum er trupulleikin.

Tann modernaði feministurin vil ikki líkjast mannfólkinum ella viðfarast sum eitt mannfólk. Hon vil verða eitt lekkurt konufólk, dyrka sítt egna ljóð og møguleikar. Tað er eyðsýnt, at eitt mannfólk hevur størri vøddabundi, so hann skal sleppa at seta køkin upp og trilla bilin heim. Sendirøðin og filmurin "Sex and the City" snýr seg um at verða kvinna. Tað er feitt at velja eitt kvøld, fara í býin við vinkonunum og bara dyrka tað at vera kvinna.